Viðmerking:

Ørkymlast um gongdina

Fleiri ymisk viðurskifti gera, at Felagið Rækjuskip er ørkymlað um gongdina hjá rækjuskipunum í ár. Tað er serliga minkandi fiskiskapur, lækkandi rækjuprísir og methøgu oljuprísirnir, sum ørkymla rækjuflotan.

Fiskiskapurin, serliga á Flemish Cap, er slakari enn undanfarnu árini, og hartil eru rækjurnar sera smáar, og geva tí lítlan prís. Í løtuni eru bert 2 føroysk skip á Flemish Cap – Ocean Castle og Høgifossur. Síðstu viku fingu bátarnir millum 40 og 50 tons hvør. Eitt skip afturat – Artic Viking – væntast at fara á Flemish Cap seinni í hesi vikuni, eftir at hava ligið á Tórshavnar Skipasmiðju í eina tíð, har teir hava gjørt fleiri størri umvælingar og annað.

Afturat slaka fiskiskapinum er prísurin á serliga smærru kókaðu rækjunum fallin munandi. Hesa tíðina í fjør og í 1998 lá miðalprísurin á rækjum á Flemish Cap um kr. 15,00 pr. kilo, meðan hann í dag liggur um 17% lægri – t.v.s. niðri á kr. 12,5 í miðal pr. kilo. Mótvegis toski og øðrum rundum fiski, sum er hækkaður nógv í prísi seinastu árini, hava rækjuprísirnir verið støðugt fallandi seinastu nógvu árini.

Seinastu uml. 4 árini hevur Kina keypt fitt av smáum kókaðum rækjum, men teir hava nú lagt so stórt innflutningsavgjald á rækjurnar, at tað er nærum ógjørligt at selja nakað tann vegin sum er. Tað ljóðar, at hetta verður gjørt sum partur av eini roynd hjá Kina at leggja trýst á í sambandi við umsókn teirra um limaskap í WTO. Føroyskir myndugleikar hava, gjøgnum danska uttanríkismálaráðið, tikið málið upp við Kina vegna Føroyar og Grønland, men eisin onnur lond við stórari rækjuveiðu – t.d. Canada – arbeiðir við at fáa eina semju við Kina um at lækkað tollin aftur.

Umframt at veiðan higartil í ár hevur svíkt, og at prísir og marknaðir svíkja, er rækjuflotin sera hart raktur av methøgu oljuprísunum. Samanborið við miðaloljuprísin hjá skipunum í 1999, liggja oljuprísirnir í løtuni uml. 57% hægri enn í 1999. Um ongin broyting hendir við oljuprísunum heilt skjótt, kann hetta koma at geva smærru rækjuskipunum eina meirútreiðslu fyri olju uppá uml. kr. 1,4 mill. og hjá størstu skipunum uml. kr. 2,2 mill. meira í 2000. Rækjuskipini brúka hvørt millum uml. 2,2 og 3,5 mill. litrar av olju um árið. Oljuútreiðsurnar hjá skipunum hava vanliga ligið um 10-15% av søluvirðinum á lastini fyri hvønn túrin, men sum nú er koma oljuútreiðslurnar at verða 17–22% av søluvirðinum.



Rækjuveiðan við Svalbard hevur heldur ikki verið av tí besta seinastu tíðina, meðan okkurt skip gjørdi onkran góðan túr fyrr í ár. Í løtuni royna 2 skip – South Island og Borgin – við Svalbard. Seinastu viku fingu bátarnir millum 25 og 30 tons hvør. Eitt annað skip, sum hevur rækjuloyvi – Sjúrðarberg – hevur enn ikki verið til fiskiskap, men hevur veitt rundan fisk í Barentshavinum.

Bert eitt føroyskt skip – Kappin – er í løtuni við Eysturgrønland. Veiðan hevur ikki verið av tí besta, men teir hava roynt at fiska kvotuna upp áðrenn teir rýma haðani. Prísurin fyri Eysturgrønlandsrækjurnar – sum fyri ein stóran part verður framleitt sum ráar rækjur til Japan, er framvegis vánaligur, hóast at kursurin á yenninum er nógv hækkaður seinastu mánaðirnar. Annars hava fleiri av hinum rækjuskipunum longu veitt sína kvotu við Eysturgrønland fyrst í árinum. Rækjukvotan hjá føroysku skipunum við Eysturgrønland er einans 115 tons í part, og Felagið Rækjuskip hevur fyri langari tíð síðani heitt á Fiskimálastýrið um at royna at útvega størri rækjukvotu antin frá ES nú, ið Grønland og ES samráðast um nýggja 6 ára fiskiveiðiavtalu, ella beinleiðis frá Grønlandi.

Sólborg er í løtuni undir grønlendskum flaggi, og nýggja skipið hjá P/F Hvilt-enni kemur ikki fyrr enn í okt. í ár.

Tvey stór ivamál um veiðirættindini hjá rækjuflotanum á Flemish Cap og við Svalbard eru eisini orsøk til, at Felagið Rækjuskip metir framtíðarútlitini hjá rækjuflotanum óviss. Innan NAFO verður av øllum alvi arbeitt fyri eini kvotuskipan fyri rækjur á Flemish Cap, í staðin fyri verandi fiskidagaskipan. Ein fundur var um hetta í Washington seinast í síðsta mánaði. Nógv bendir á, at tað antin verður samtykt ein kvotuskipan á NAFO-ársfundinum í september, men um semja ikki fæst um hetta, verður fiskidagatalið helst skert heilt munandi í mun til verandi fiskidagatal. Hin stóri ivaspurningurin er, nær ella um tað fer at eydnast at fáa eina semju við Noreg um føroyska fiskidagatalið við Svalbard, sum teir av sínum eintingum lækkaðu í 1997, við nærum eini helvt, úr 2555 til 1317 fiskidagar. Eisini metir Felagið Rækjuskip, at vandi er fyri at Noreg setir eina kvotuskipan fyri rækjur í verk við Svalbard, so skjótt sum ein kvotuskipan er komin á Flemish Cap.

Samanumtikið metir Felagið Rækjuskip, at um ongin broyting hendir við minkandi veiðuni, lækkandi søluprísunum og høgu oljuprísunum er ongin ivi um, at hetta at ávirka úrslitini hjá rækjuflotanum í ár so mikið, at trupult verður at sleppa undan reyðum tølum í roknskapunum.

Felagsins vegna
Jákup Egholm Hansen

Partapolitisk villleiðing fyri tínar og mínar skatta- og avgjaldskrónur!

Landsstýrisflokkarnir hava enn einaferð framt valdsmisnýtslu við at brúka almennan pening til einsíðuga propaganda fyri fullveldi.

Nú um dagarnar kom snotiligur faldari inn um dyrnar í hvørjum húsi í Føroyum við heitinum ***Frá heimastýri til fullveldi***. Útgevari er Føroya Landsstýri, og endamálið sigst vera at kunna føroyingar um ætlan landsstýrisins og *at bøta førleikan hjá fólki at kjakast um og taka støðu til málið um framtíðarstøðu Føroya.*

Einsíðug propaganda

Hvussu landsstýrisflokkarnir ímynda sær, at førleikin til at kjakast og taka støðu til framtíðarstøðu Føroya grundað á einsíðuga propagandaherferð í formi av hvítum og svørtum bókum (longu á forsíðunum byrjar propagandaherferðin), heimasíðum, valdtøku av almennum fjølmiðlum og nú við bóklingi, ið bert lýsir landsstýrisflokkana sjónarmið, er ilt at síggja.

Alt hetta er fíggjað við óavmarkaðum almennum skatta- og avgjaldskrónum, og upplýsingarherferðin lýsir bert ta einu síðuna, ta hjá fullveldisflokkunum. Andstøðan sleppur ikki framat og fær ikki klovið oyra at siga sína hugsan um málið. Vorðið sum bøttur førleiki!

Ódemokratiskur háttur

Vóru landsstýrisflokkarnir tað allarminsta vetið at sær komnir, lótu teir andstøðuna eisini hava sína ávirkan á upplýsingarherferðina og siga sína hugsan um fullveldismálið.

Sambært teimum upplýsingum, sum fram eru komnir í seinastuni frá landsstýrinum, hava landsstýrisflokkarnir nýtt 10 mió. almennar krónur til fullveldismálið, tá ið hetta árið er farið, um sumu tíð, sum andstøðuflokkarnir sjálvir hava verið noyddir at goldið fyri sínar kunningar til Føroya fólk.

Hetta kann ikki annað enn geva eina himmalrópandi slagsíðu, sum ikki er einum framkomnum landi sum Føroyum verdugt.

Villleiðandi upplýsingar

Samstundis sum bóklingurin skal verða við til at menna kjakið um framtíðarstøðu Føroya, er hann ikki bara einsíðugur, nei hann er beinleiðis villleiðandi. Tær nýtist ikki at lesa meira enn fyrstu síðu í bóklinginum fyri at staðfesta villeiðing oman á villleiðing.

Tak bert ordingina *"og í ár verður bert umleið ein triðingur av danska studninginum brúktur í samfelagnum"*. At landsstýrið torir! Hví verður bert ein triðingur av blokkinum nýttur? Jú, tí at heilsuverkið, skúlaverkið, sosial mál o.s.fr. o. s. fr. verða niðurpínd, so at

borgarin ikki kann hava álit á tí tænastu, hesir stovnar skulu veita.

Ringast stendur til við sjúkrahúsverkinum. Tú stúrir fyri at skula koma í ta vanlagnu, at hava tørv á hesi tænastu. — Har manglar ein heil milliard krónur. Og hetta er peningur, vit hava fingið frá dønum til sjúkrahúsverkið, men sum vit antin hava brúkt til annað fjas ella ikki nýtt fyri at kunna siga, *_at í ár nýta vit bert ein triðing av danska studninginum"*, hvør skal siga, at vit nu næstan megna at fíggja fullveldið! Villleiðing!

Vanvirða demokratisku spælireglurnar

At Tjóðveldisflokkurin vanvirðir demokratisku spælireglurnar, hava vit nógv dømi um, men at bæði Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin eisini eru farnir at gera tað sama, er skelkandi.

Johan Petersen

Suðuroyarsiglingin og samtyktir - Hvar er logikkurin?

Sunnudagin 16. Apríl 2000 samtyktu bý-og bygdaráðsformenn í Suðuroy saman við vinnulívsmonnum úr oynni at senda landstýrinum skriv, har tey siga, at tey undir ongum umstøðum góðkenna, at Dúgvan verður sett at røkja siglingina til Suðuroy meðan Smyril er í dok.

Nú ljóðar at strandfaraskip landsins hevur leiga eitt skip "Claymore" sum eftir útsøgnum í bløðunum er á sama støði sum Dúgvan, munurin er at tað tekur nakrar traylarar meira men væl minni ferðafólk enn Dúgvan.

Tí vil eg spyrji, hvar er logikkurin við hesari samtykt.

Eitt skip á sama støði sum Dúgvan er leiga til suðuroyarsiglingina og tú hoyrir ikki eitt pipp frá nøkrum bý- og bygdaráðsformanni, vinnulívsmanni og so slet ikki frá løgtingsmonnum sum eru valdir í Suðuroy.

• Er samtyktin frá 16. apríl ikki galdandið tí skipið eitur "Claymore" og ikki Dúgvan?

• Er samtyktin, í er viðtikin av tjóðveldis og fólkafloks bý-og bygdarásformonnum bert lótir, fyri at fjala yvir óskilið í landstýrinum og samgonguni, viðvíkjandi strandferðsluni?

• Skulu fólk í Suðuroy blíva við at siga takk til molarnar, sum tey fáa blaka norðanfjørðs frá?

Eg spyrji bara.

Tvøroyri 11. mai 2000
Finnleif Guttesen

Poul Færø talar í Århus

Odense er ein eitt sindur løgin býur, tí ikki alt sær út, sum tað er. Hann verður skýrdur ævintýrbýurin, og citrónin verður eisini pressað meir enn gott er við H. C. Andersen nøvnum bæði her og har. Ævintýrfigurarnir hjá honum eru eisini so at siga á hvørjum plássi. Men undir skræðuni er ikki nógv ævintýr nógvastaðni, tí býurin hevur met í kriminaliteti og av fólki, sum doyggja av narko. Her verður nógv spælt um pening ólógliga og nógvar okkultar og nýreligiøsar rørslur hava havt og hava sína gongd her.

Í søguni hava nakrar vekingar verið í nánd her av Óðinsstaði; men eingin er komin heilt framat. Tað kann vera, at heiðna navnið fjøtrar býin.

Tað er ikki tann stóri túsundtals skarin, sum játtar trúgv á Harran Jesus Kristus; men nøkur hundrað hava hvørki boygt knæ fyri Óðini ella Baal, og tað er gleðiligt, at so gott samfelag er ímillum fólk úr fólka- og fríkirkjum.

Í góð 17 ár hava vit havt føroyskt evangeliskt virki her í Óðinsstaði, Skýlið kallað. Vit vilja gjarna vera eitt skjól fyri fólk, sum koma hendavegin at útbúgva seg. Ein vernd ímóti ágangi frá hesum og hasum undir skræðuni.

Vit hava hesi ár havt bíbliutímar og kristiligar fundir – mest í Odense men eisini aðrastaðni á Fjóni.

Hóskvøldið 18. mai kl. 19 hava vit aftur fund – hesaferð við Poul Færø. Øll eru hjartaliga vælkomin – eisini til drekkamunnin aftaná. Fundurin verður í missiónshúsunum hjá Luthersk Mission, Vesterbro 9 B, mitt í Odense.

Allar neyðugar kunngerðir lýstar og settar í gildi

Kongligu fyriskipanirnar eru settar í gildi við virkningi frá 1. januar ár 2000, og kunngerðirnar eru dagfestar 11. februar ár 2000 og lýstar í kunngerðasavninum, sigur Høgni Hoydal, mentamálaráðharri

ÓLAVUR Í BEITI

Tað var Lisbeth L. Petersen, løgtingsmaður, sum í fyrispurningi spurdi, hví ikki allar landsstýriskunngerðir eru avgreiddar í sambandi við nýggju kirkjulógirnar? Og Høgni Hoydal svarar, at allar neyðugar kunngerðir eru lýstar og settar í gildi.

Í svarinum hjá Høgna Hoydal verður upplýst, at Føroya Løgting samtykti 20. januar 1998 at viðmæla, at nakrar danskar kirkjulógir vórðu settar í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan og ávísum broytingum. Løgmaður hevur, 28. januar 1998, staðfest hesi ríkislógartilmæli, og landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum hevur, 4. februar 1998, avgreitt hesi mál víðari til Kirkjumálaráðið.

Mett neyðugt

Lógirnar, sum talan er um, eru: Lov om folkekirkens økonomi, Lov om ansættelse i stillinger i folkekirken m.v., Lov om folkekirkens kirkebygninger, Lov om bestyrelse og brug af folkekirkens kirker,Lov om begravelse og ligbrænding, Lov om udnævnelse af biskopper og stiftsbåndsløsning og Lov om medlemskab af folkekirken, kirkelig betjening og stiftsbåndsløsning.

– Kongligu fyriskipanirnar eru settar í gildi við virkningi frá 1. januar ár 2000, og kunngerðirnar eru dagfestar 11. februar ár 2000 og lýstar í kunngerðasavninum sum: Kunngerð um Próstadømisráð, Kunngerð um kirkjugrunnin, Kunngerð um bygningar fólkakirkjunnar og Kunngerð um kirkjukassar.

– Sostatt eru allar kunngerðir gjørdar, sum vórðu mettar neyðugar, fyri at nýggju lógirnar kundu setast í gildi í Føroyum, sigur Høgni Hoydal.

Góð fyribilsloysn

Og víðari sigur mentamáláraðharrin í svarinum, at tá funnist verður at, at landsstýrismaðurin letur ávísar heimildir til Stiftsstjórnina, skal verða sagt, at landsstýrismaðurin heldur, at heimild er fyri hesum. Landsstýrismaðurin ætlar at áseta reglur, sum samsvara við tær reglur, sum landsstýrið í lógini um roknskaparhald landsins skal gera. Hesar reglur eru ikki tøkar enn.

Landsstýrismaðurin hevur hildið, at tað, at lata ávísar uppgávur til Stiftsstjórnina, var ein góð fyribilsloysn, við tað at Stiftsstjórnin framman undan tók sær av hesum, sigur Høgni Hoydal.

Eins góða atgongd til almennan pening

– men tað er ikki galdandi fyrr enn sáttmálin millum Føroyar og Danmark er undirskrivaður, sigur Anfinn Kallsberg í svari til Edmund Joensen, sum hevur spurt um kunning um fullveldi

ÓLAVUR Í BEITI

Edmund Joensen, løgtingsmaður, setti løgmanni tveir spurningar, har spurt verður, um landsstýrið hevur ætlanir um av nýggjum at kunna føroyingar um avleiðingarnar av einum møguligum fullveldi, nú fortreytirnar eru munandi broyttar? Og um landsstýrið ikki sjálvt ætlar at kunna føroyingar av nýggjum um avleiðingarnar av einum møguligum fullveldi, eru so nakrar ætlanir um at lata andstøðuna fáa burtur av játtanini til sjálvstýrismál, so at andstøðan kann útvega føroyingum upplýsingar, sum samsvara við nýggju støðuna?

Í svarinum, sigur løgmaður m.a., at landsstýrið fer sjálvsagt ikki at broyta kunningina grundleggjandi orsakað av at danska stjórnin nú hevur almannakunngjørt sítt samráðingarútspæl. Vit eru í eini samráðingarstøðu. Vit vita ikki hvussu tann endaligi sáttmálin fer at síggja út, fyrr enn hann er liðugur. Tað ber heldur ikki til at siga nakað neyvt um avleiðingarnar, fyrr enn samráðingarnar eru førdar á mál, sigur Anfinn Kallsberg.

Kunningarherferð

Viðvíkjandi seinna spurninginum, sigur løgmaður, at landsstýrið hevur heldur ongar ætlanir um at lata andstøðuni á tingi almennan pening til eina kunningarherferð.

– Tað er landsstýrið sum stendur fyri fullveldisætlanini og samráðingunum við donsku stjórnina, og vit kunna um hetta so nógv sum gjørligt. At latið politiskum flokkum – tað verið seg andstøðuflokkum ella samgonguflokkum – pening til at kunna um arbeiðið hjá landsstýrinum, hevði verið brot á allar siðvenjur.

– Men tá sáttmálin er undirskrivaður, er kortini ætlanin, at vit í sambandi við lógaruppskotið um fólkaatkvøðuna eisini fara at leggja fram eitt uppskot um eykajáttan til stuðul til flokkar og fylkingar, sum ynskja at kunna upp til fólkaatkvøðuna.

– Orsøkin til hetta er, at tá sáttmálin er liðugur, er arbeiðið hjá landsstýrinum liðugt, og løgtingið og Føroya fólk skal taka støðu. Hendan avgerð fer at byggja á politiska støðutakan, og kunningin upp undir fólkaatkvøðuna verður tí meira politisk enn faklig. Tí eiga tey, sum eru fyri, og tey, sum eru ímóti, at hava eins góða atgongd til almennan pening, sigur Anfinn Kallsberg í svarinum til spurningarnar hjá Edmundi Joensen.

Carl Jóhan Jensen fær starvsløn

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Høgni Hoydal, gjørdi herfyri av at lata Carl Jóhan Jensen ársins starvsløn. Starvsløn er fyri 6 mánaðar og verður latin eftir umsókn til Undirvísingar- og Mentamálastýrið. Nevnd, ið umboðar listafólk, ger tilmæli til landsstýrismannin um, hvør eigur at fáa starvsløna. Hetta er aðru ferð, at starvsløn verður latin sambært játtan á fíggjarløgtingslógini "Heiðursgávur til mentafólk." Í 1999 fekk Pauli í Sandagerði starvsløna.

Lýst varð eftir umsóknum 11. mars 2000 við umsóknarfreistin 3. apríl 2000. Á fundi 9. apríl viðgjørdi nevndin tær 12 innkomnu umsóknirnar. Fleiri teirra vóru sera áhugaverdar, umframt at verða vælegnað evni til starvslønarmóttakara.

Eftir at allar umsóknirnar vóru viðgjørdar, samdist nevndin um at mæla landsstýrismannimum til at lata 6 mánaðar starvsløna til Carl Jóhan Jensen, og staðfesti landsstýrismaðurin tilmæli 19. apríl 2000.

Carl Jóhan Jensen er fødddur í 1957 og uppvaksin við Tinghúsvegin í Havn. Hann er cand.phil. í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum og er rithøvundur. Fyrsta yrkingasavnið gav hann út sjálvur í 1977. Síðani hevur Carl Jóhan Jensen skrivað fimm yrkingasøvn, tvær skaldsøgur og í fjør kom bókin *Mentan og mentaskapur.* Tvær ferðir hava bøkur hjá honum verið í uppskoti til norðurlendsku bókmentavirðislønina, og hann fekk M. A. Jacobsens bókmentavirðisløn í 1990.

Nevndin mælti til, at Carl Jóhan Jensen fekk starvsløna út frá teirri áskoðan, at umsøkjarin lýkur tey krøv, sum sett eru í reglugerðini fyri veiting av heiðursgávum til mentafólk v.m. Harumframt var verkætlanin hjá Carl Jóhan Jensen sera áhugaverd. Carl Jóhan Jensen er í ferð við at skriva eina skaldsøgu, sum tykist at verða bæði spennandi og nýskapandi í føroyskum skaldskapi. Nevndin metti, at starvsløn kann gerast eitt gott amboð hjá rithøvundum at leggja alla orku í arbeiði at skapa og skriva eina nýggja føroyska skaldsøgu.

Føroyar fáa somu støðu sum Ísland

Um danska stjórnin og Fólkatingið góðtaka at geva føroyingum somu skipan sum íslendingar, verður støðan hjá teimum lesandi óbroytt í mun til í dag, sigur Høgni Hoydal í svari til Heðin Mortensen

ÓLAVUR Í BEITI

Heðin Mortensen setti Høgna Hoydal tríggjar spurningar viðvíkjandi støðu teirra lesandi í Danmark, og spyr í teim fyrru spurningunum um útbúgvingarmøguleikar hjá føroyingum í Danmark, um so er, at Føroyar verða skipaðar sum fullveldisríki, og danskan lestrarstuðul, um Føroyar verða skipaðar sum fullveldisríki, og føroyingar mistu sín ríkisborgararætt í Danmark.

Í svarinum til hesar spurningar, sigur Høgni Hoydal m.a., at um danska stjórnin og Fólkatingið góðtaka at geva føroyingum somu skipan sum íslendingar, verður støðan hjá teimum lesandi óbroytt í mun til í dag.

– Hartil er at siga, at norðurlendskur sáttmáli er gjørdur, sum tryggjar at fólk úr Danmark, Finnlandi, Íslandi, Noregi og Svoríki hava javnbjóðis atgongd til hægri lestur við lærustovnarnar hjá hvørjum øðrum. Í sáttmálanum binda partarnir seg til at tryggja øllum, sum ynskja at fara undir hægri lestur, og búgva í einum øðrum norðurlandi, javnbjóðis atgongd til hægi lærustovnarnar í teimum 5 londunum.

– Tá ríkisrættarligu viðurskiftini verða broytt, er landsstýrisins ætlan, at gerast sjálvstøðugur sáttmálapartur í øllum norðurlendskum sáttmálum, eins og at fáa sjálvstøðuga umboðan í norðurlendskum samstarvi annars. Sambært teimum upplýsingum landsstýrið hevur, er ongin forðing fyri hesum — hinvegin er tað júst fortreytin fyri at gerast javnbjóðis partur í norðurlendskum samstarvi og sáttmálum, at landið hevur fullveldi.

– Landsstýrið miðar eftir, at føroyskur lestrarstuðul verður veittur til tey, sum lesa í hinum norðurlondunum eins og uttanfyri norðurlond, og at hesin stuðul verður fult so nøktandi sum í dag, sigur Høgni Hoydal.

Ikki beinleiðis avtalur

Viðvíkjandi triðja spurninginum, um hvussu langt landsstýrið er komið við at gera avtalur við onnur lond um samstarv á útbúgvingarøkinum, svarar Høgni Hoydal, at Landsstýrið kann ikki gera beinleiðis útbúgvingaravtalur fyri føroyskar ríkisborgarar fyrr enn fullveldi er staðfest.

– Tó er sjálvsagt nógv samstarv um útbúgvingar- og granskingarspurningar — serstakliga við hini norðurlondini. Í flestum førum er talan um ítøkiligar samstarvsavtalur millum einstøku stovnarnar, eitt nú millum Fróðskaparsetur Føroya og ymsar lærdar háskúlar í Onglandi og hinum norðurlondunum.

– Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur annars gjørt eina samstarvsyvirlýsing við íslendska undirvísingar- og mentamálastýrið. Henda avtala fevnir m.a. um samstarv á útbúgvingar- og granskingarøkinum. Eitt ávíst samstarv er við Ísland frammanundan, men arbeiðt verður í løtuni við at fylla út karmarnar fyri samstarvinum, sigur Høgni Hoydal m.a. í svarinum.